## DAGSINS MEINING

# Eingin hálv loysn til suðringar

Tað sær ikki mætari út enn at landsstýrið hevur ilt við attaka eina støðu, tá tað snýr seg um at taka suðuroyingar og Suðuroynna fyri fult. Tað sýnist sum at hesin fjarskotni parturin av landinum líkasum hoyrir ikki til Føroyar, og er hetta ein støða, sum ikki minnir sørt um hana í Íslandi, har nærum øll menning snýr seg um Reykjavíkarøkið.

Ikki minni enn fýra ferðir er avgerðin um at byggja nýtt suðuroyarskip útsett. Hvør endin verður munnu gudarnir vita. Málið er einfalt, antin verður avgerð tikin um eina heila loysn ella eina hálva loysn. Smyril er og verður í mong mong ár enn høvuðsæðr suðuroyinga til hjartað av landinum, Tórshavn. Tað er nakað, sum øll onnur í hesum landi mugu gera sær greitt. Eisini landsstýrismaðurin í samferðslumálum, sum í sending í SVF tíanverri helt seg til ta hálvu og næstbestu loysnina, tá tað snýr seg um at byggja nýtt skip til Suðuroynna.

Nú vil onkur siga, at tað er ikki neyðugt at brúka heilar 300 mill. kr. til nýtt suðuroyarskip. Hví kunnu teir ikki taka til takkar við einum skipi, sum er einar 100 mill. kr. bíligari! Suðuroyingar – og tað gjørdi vágstingmaðurin Henrik Old púra greitt í SVF-sendingini týskvøldið - vilja hava eitt skip, sum siglir 21 míl og sum er ein heil loysn. Vónandi fær hann fullan stuðul frá hinum tingmonnunum í oynni, eisini honum, sum situr í samgongu.

Trýhundrað milliónir ljóða nógv, tá hugsað verður um nýtt strandfaraskip. Men hetta er ikki ov nógv, tá hugsað verður um, hvussu skerdir suðuroyingar eru í øllum viðurskiftum við at liggja so langt burturi frá meginøkinum. Tá nú vágafólk fáa fast samband við meginøkið og útlit eru til, at Norðoyggjar eisini fáa tað, so er tað einki meira enn rímuligt, at tað sjóvegis sambandið, sum suðuroyingar skulu liva við næstu 20 árini, er tað best hugsandi. Nú má og skal nakað henda í hesum máli. Tað er sera umráðandi, at tingmenn úr øllum landinum stuðla suðuroyingum í at fáa tað besta skipið, tí tað hava teir uppiborið. Latið vera við at kuta av og harvið koma við einum skipi, sum bara er ein hálv loysn.

Annars var hatta stutta tjakið í Breddanum í SVF nakað av tí rætta. Tað eru slík orðaskifti, sum vit sakna í loftmiðlunum, tí teir eru eitt so gott forum fyri slíkum. So haldið fram við hasum og gerið tað til ein náttúrligan part av sendingunum. Stutt og kontant tjak av hesum slagnum kann bara betra um føroyska partin av sjónvarpi okkara.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Ein slóðbrótari á landbúnaðarøkinum sjeyti ár



Hósdagin 22. mars fyllir Fritleif Joensen í Fuglafirði sjeyti ár. Mangir fuglfirðingar kalla hann „bóndin“. Og satt at siga er hetta vælhóskandi, tí fáur hevur gingið so høgt upp í sítt bóndayrki og lagt so nógv eftir seg sum hann.

Sum 14 ára gamal fór Fritleif til skips. Hann hevði góða sjónátúr og dámdi væl á sjónum. Mitt í fimti árunum fór hann til Íslands, har hann var í fleiri ár við íslendskum trolara.

Honum dámdi væl í Íslandi, og hann hevur stóra virðing fyri íslendingum, hesi lítlu tjóð við sínum 270.000 íbúgvum sum hevur megnað at vunnið sær fult tjóðarfrælsi. Hann fylgdi væl við tí, ið hendi í Íslandi tey árini, hann var har.

Í 1962 tók Fritleif garðin eftir pápa sín. Í hesum starvi gjørdi Fritleif veruliga vart við seg.Eitt tað fyrsta hann gjørdi, var at fáa sær ein nýmótans traktor.Við hesum traktori velti hann upp úr nýggjum. Byrjað varð í Toftabønum og tað gekk skjótt fyri seg.

Men ikki so mong ár seinni tók samtykti kommunustýrið, at Toftabøurin skuldi nýtast til grundstykkir – sjálvandi eftir at hava tosað við Fritleif um tað.

Fritleif var ,sum vera man, alt annað enn glaður um hesa avgerð bygdaráðsins, men hann dugdi tó at skilja teir, ið tóku avgerðina, og tók tað til eftirtektar.

Fritleif ætlaði sær tá, at fara norður í Halgadal, og har dyrka upp úr nýggjum. Hann fór dir at grava veg norður í Halgadal.Tað var ikki nakað lætt arbeiði, tí brattlendi var nógvastaðni. Men so hendi tað, at Fritleifi stóð í boði, at fáa møguleikan at dyrka úti undir Varmakeldueiðnum. Gunnleivur bóndi í Norðragøtu og fleiri vóru fúsir at gera gerðabýti við Fritleif, ið gekk út uppá, at Fritleif skuldi fáa nevnda øki,ið teir áttu, so skuldi Fritleif dyrka upp úr nýggjum fyri teir. Ein frálík avtala.

Fritleif, og yngri bróðir hansara Bergtórur, løgdu til brots at velta, og tað gekk ikki long tíð, so vóru teir komnir á mál. Ódyrkaða hagajørðin varð vorðin til nógvar vakrar grønar teigar, ið skilti seg frá restinum av økinum.

Seinni varð farið undir at byggja fjós til mjólkikýr, og tað gekk við somu ferð.

Men Fritleif gavst ikki so.Símun Pauli á Mørkini, beyð Fritleifi at keypa jørðina frá sær, tí eingin av hansara tók yvir, tá hann legði frá sær. Pauli mundi vita, hvat hann gjørdi, hann visti óivað, at í betri hendur kom garðurin ikki.Pauli sýndi satt stórsinni.

Tað gekk ikki long tíð, so fór Fritleif undir at gera veg niðan í Innandal.Hetta var stórarbeiði, men tað stóð ikki á, hetta megnaði Fritleifur næstan einsamallur. Eitt ótrúligt avrik.

Tá ið vegurin var gjørdur varð farið at velta. Innandalurin hevur altíð verið vakur, men hann gjørdist uppaftur vakrari nú hann varð uppdyrkaður.

Tað vóru ikki bert fuglfirðingar, ið løgdu til merk is, tað megnar arbeiði, ið Fritleif hevði gjørt.Nei tað er ikki ov nógv sagt, at flest allir bøndur í Føroyum, og tey, ið fingust við landbúnaða, høvdu givið sær far um tað.

Undirritaði, sum mitt í sjeyti árunum var limur í Løgtingsins fíggjarnevnd, kann minnast hvussu viðgerðin fór fram í fíggjarnevndini, tá peningur skuldi játtast til jarðargrunnin. Landsstýrið, ið tá sat, mælti til, at hækka játtanina munandi úr 600.000 uppí 5 mió.kr. Undir nevndarviðgerðini varð avrikið hjá Fritleifi bónda umrøtt, og ein stórur meirilut í fíggjarnevndini mælti til at hækka játtanina við tveimum mió. kr. aftrat teimum fimm, so samlaða játtanin varð 7 mió. kr. Eg tori at siga, at avrikið hjá bóndanum var orsøkin til ta positivu viðgerðina, ið málið fekk.

Fritleif var í mong ár valdur í Jarðarráðið, har av fleiri sum formaður. Fritleif hevði innlit í hetta økið. Hann dugdi væl at finna semjur ímillum partar, og hann var væl lýddur av teimum, hann samstarvaðist við.

Fritleif hevur altíð fylgt væl við tí, sum hendir á tí politiska økinum. Og ikki mist í hesum døgum, nú fullveldið stendur fyri framman. Hann livir mitt í verðini. Her er eingin slingur í valsinum, føroyingar eiga eins og íslendingar at taka fulla ábyrgd av sínum landi.

Eg møtti honum henda dagin samgongan hevði tikið endaligu støðu í fullveldismálinum. Tá helt hann fyri: Eg vóni eg livi til eg verði 82, so eg upplivi at vit føroyingar gerast ein sjálvstøðug tjóð og fer at teljast millum frælsar tjóðir.

Fullveldismálinum fylgdi Fritleif væl við, ja hann kendi tey mongu uppskotini heilt niður í smálutir.

Somuleiðis, hvat andstøðuflokkarnir bóru fram, um ætlaða fullveldið.

Í 1970 stillaði eg fyrstu ferð upp til løgtingsval fyri tjóðveldisflokkin í Eysturoynni. Ein teirra sum heitti á meg, var Fritleif sum tá var 40 ára gamal. Síðani tá havi eg næstan dagliga tosð við Fritleif. Hann hevur verið ein hollur stuðul í tí politiska arbeiðnum, og er altíð góður at ráðføra seg við. Hann er trúgvur sum trøllið. Gongur ímóti og trupulleikar eru at dragast við, so er Fritleif maðurin, tú altíð kanst rokna við og líta á. Slíkar dygdir eru gull verdar.

Tað er altíð hugnaligt at koma inn á gátt hjá Fritleifi og Lenu. Bæði eru løtt av lyndi, altíð við tí góða orðinum. Lena hevur altíð verið manni sínum ein hollur stuðul, í tí hann hevur tikist við.

Tey eru familjukær og koma nógv saman við sínum børnum, ommu – og abbabørnum og langommu – og langabbabørnum.

Góði Fritleif eg fari at ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum sjeyti árunum, og vóni tú fært mong góð ár aftrat.

**Signar á Brúnni**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Eingin semja í væntu

**Carita Bjørklund, formaður í Føroya Pedagogfelagi, heldur ikki, at felagið hevur fingið eina haldgóða grundgeving fyri at samráðast við kommunurnar. Eisini vísir hon á, at felagið vil hava ein sáttmála við allar kommunur, ið hava barnaansing**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*



*Nevndin í Føroya Pedagogfelagi hevði kunnandi fund við álitisfólkini mikumorgunin, har støðan varð umrødd, nú felagið er farið í verkfall*

*Mynd: Jens K. Vang*

Tað tykist ikki, sum at nøkur semja er í væntu í trætuni millum løgmann og Føroya Pedagogfelag.

Carita Bjørklund vísir aftur, at felagið niðurger kommunurnar í Føroyum við at sáa iva um samráðingarrættin. Hon vendir tí við og sigur, at løgmaður kundi víst størri virðing fyri teimum og kommununum við at geva greið boð heldur fyrr enn fyrst í februar, tá pedagogfelagið fekk boð um, at tað skuldi samráðast við kommunurnar.

– Trupulleikin snýr seg ikki um, hvønn vit vilja samráðast við, men heldur vil eg vísa á, at vit ikki hava fingið nakra haldgóða grundgeving til at samráðast við kommunurnar, sigur Carita Bjørklun.

Hon leggur afturat, at málsviðgerðin hjá landsstýrinum hevur verið undir allan kritik.

– Tað er umráðandi hjá okkum at fáa staðfest, at kommunurnar hava heimild til at samráðast um ein sáttmála við okkum. Tað skal staðfestast, at tær eru góðkendar og formaliseraðar, sigur Carita Bjørklund.

Løgmaður sigur, at hann hevur givið teimum greið boð, men felagið sigur seg ikki kunna fyrihalda seg til tær metingar, ið løgmaður hevur av lógini.

– So leingi løgmaður bara hevur nakrar leysar metingar, kunnu vit ikki fyrihalda okkum til tær, sigur Carita.

Formaðurin sigur, at felagið ikki vil leggja seg útí, hvussu kommunur skipa seg innanhýsis, men hon slær fast, at felagið vil hava ein sáttmála við allar kommunur, ið skipa fyri barnaansing.

Tað tykist ikki, sum at nøkur semja er í væntu, tí Føroya Pedagogfelag er ikki sannført um, at tað eru kommunurnar, ið hava samráðingarrættin.

Nevndin í felagnum hevði kunnandi fund við álitisfólkini mikumorgunin og eftir tað hevði nevndin fund innanhýsis. Eingin niðurstøða var- fingin frá hesum fundinum, tá blaðið fór til prentingar.

Carita Bjørklund dugir ikki at siga, hvussu leingi verkfallið fer at vera, men tað veldst um, hvussu leikur fer í trætuni.

Løgmaður um verkfallið:

# Pedagogfelagið niðurger kommunurnar

**Løgmaður mælir Føroya Pedagogfelagi til at góðtaka ta niðurstøðu, hann og løgtingið hava gjørt í málinum. Harafturat vísir løgmaður á, at pedagogfelagið niðurger kommunurnar við at sáa iva um, at tær hava rættin til at samráðast um sáttmála við pedagogarnar**

VERKFALL
*Stefaní Skorini*

Løgmaður fer ikki at lyfta hond frá síðu í sambandi við, at Føroya Pedagogfelag hevur boðað frá arbeiðssteðgi. Hetta sigur Anfinn Kallsberg við Sosialin mikumorgunin.

Verkfallið varð sett í gildi á midnátt týskvøldið, og mikumorgunin var eingin av teimum 500 limunum hjá pedagogfelagnum til arbeiðis á ansingarstovnunum kring landið.

– Løgmaður hevur einki við hetta verkfallið at gera. Eg havi fingið nøkur skriv frá einum felag, ið ikki vil góðtaka, at kommunar hava fingið ábyrgdina á hasum økinum, sigur Anfinn Kallsberg, ið vísir á, at hann hevur svarað øllum hesum skrivum.

– Hóast kommunar hava fingið ábyrgdina av ansingarøkinum, so vil pedagogfelagið sleppa at samráðast við Fíggjarmálastýrið. Tað ber ikki til, tí landskassin hevur onga fíggjarliga ábyrgd av barnagørðum kring landið. Tað hava kommunar, og tí skulu tær gera sáttmálar við pedagogfelagið eins og tær hava gjørt við Føroya Arbeiðarafelag, sigur løgmaður.

### Skeiv adressa

Løgmaður mælir tí Føroya Pedagogfelagi til at fara til samráðingarborðið við kommunum beinanvegin og vísir á, at felagið vendir sær til skeiva adressu, tá tað vendir sær til løgmann.

– Eg havi boðað felagnum frá, at samráðingar skulu fara fram við kommunurnar, men hóast tað verður boðað frá verkfalli, tí felagið ikki góðtekur, at Løgtingið hevur sagt, at kommunurnar hava ábyrgd á hesum økinum, sigur Anfinn Kallsberg.

Pedagogfelagið vísir hinvegin á, at allar kommunurnar ikki eru umboðaðar í kommunufeløgum. Tí er tað torført hjá felagnum gera tann sama sáttmálan við allar kommunurnar. Formaður í Føroya Pedagogfelagi, Carita Bjørklund, hevur víst á, at felagið vil hava ein sáttmála fyri allar pedagogar.

Anfinn Kallsberg vísir á, at kommunurnar eru fólkavaldar og skulu m.a. syrgja fyri barnaansing fyri borgararnar, so tað er eingin orsøk til at ivast í, um tær ikki hava førleika til at samráðast um ein sáttmála og leggur afturat, at hetta er at niðurgera kommunurnar.

– Landið kann ikki tvinga kommunur til at skipa seg á ein ávísan hátt, sigur løgmaður.

Løgmaður vísir at enda á, at Løgtingið hevur sligið fast, at tað eru kommunurnar, ið skulu samráðast við pedagogarnar, og man eigur at samráðast við tann, ið hevur ábyrgdina.

Pedagogfelagið hevur fýlst á, at boðini úr Tinganesi hava verið ógreið, men løgmaður heldur, at orsøkin til at Pedagogfelagið hevur vent sær til sín er tann, at tað vil hava greið boð.

Tað metir løgmaður, at felagið nú hevur fingið.



*Løgmaður fer ikki at leggja seg útí verkfallið hjá Føroya Pedagogfelagi. Hann mælir felagnum til at fara til samráðingarborðið skjótast til ber*

# Klárar til samráðingar

**Føroya Pedagogfelag hevur fingið innbjóðing til at koma til samráðingar við Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag (FAK) og Kommunusamskipan Føroya, men enn eru ongar samráðingar farnar í gongd**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Føroya Pedagogfelag vísir hinvegin aftur á tann trupulleika, at allar kommunurnar ikki eru umboðaðar í hesum felagsskapum.

Í Kommunusamskipan Føroya eru seks tær størstu kommunurnar umboðaðar, meðan 32 eru við í FAK. Tilsamans eru 48 kommunur í Føroyum. Sostatt eru tað sekstan, ið ikki eru við, um pedagogfelagið fer í samráðingar við hesar báðar felagsskapir.

Anna Larsen, virkandi formaður í FAK, vísir á, at teirra felag hevur boðið pedagogfelagnum til samráðingar, og hetta tilboðið stendur við.

– Vit eru altíð klár at fara til samráðingarborðið, sigur Anna Larsen, sum er hørm um, at fólk kunnu hava fingið ta fatan at hennara felag ikki hevur neyðugan førleika at samráðast.

Anna Larsen kann ikki svara einvíst um, hví allar kommunur ikki eru við í felagnum. Hon nevnir, at summar hava heilt einfalt ikki nakað arbeiðsfólk og hava tí ikki tørv á at vera við. Aðrar hava skipað seg øðrvísi. Til dømis nevnir hon, at Hósvíkar kommuna hevur gjørt sáttmála við dagrøktarmammurnar ígjøgnum Føroya Arbeiðarafelag.

Anna Larsen vísir á, at Pedagogfelagið ikki kann leggja seg úti, hvussu kommunur skipa seg innanhýsis í Føroyum, tí tað er upp til tær sjálvar at avgera.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur ongantíð verið í iva um, at tað hevur samráðingarrættin, og í tíðindaskrivi vísir felagið á, at framferðin hjá pedagogfelagnum tykist løgin, men felagið er til reiðar at fara til samráðingarborðið.